## Dýrur hjúnaðarskilnaður

Sir Paul McCartney er í hesum døgum í rættinum í sambandi við hjúnaðarskilnaðin frá konuni Heather Mills. Tey bæði blivu gift í 2002, men hjúnaðarbandið helt ikki, og í 2006 fóru tey hvør til sítt. Áðrenn tað høvdu tey tó fingið eina dóttir saman. Rættarmálið byrjaði við grummum lagi á teimum báðum, men eftir rættarfundirnar í gjár tóktist lagið betri, og tað er nú nógv, ið bendir á, at tey skiljast í sátt og semju. Heather Mills hevði upprunaliga ætlað at kravtmillum 80 og 100 milliónir pund (800-1000 milliónir krónur), men væntandi endar tað við umleið hálvari milliard. Ikki so galið kortini.



## Credit Suisse niðurskrivar

Sveisiski stórbankin Credit Suisse sleppur heldur ikki undan døpru avleiðingunum av subprimekreppuni, og bankin leggur nú fram eitt avlop fyri fjórða ársfjórðing, sum er 72% minni enn sama tíðarskeið í fjør. Tað eru niðurskrivingar á tilsamans 1,3 milliardir sveisarafrank (6,1 milliard krónur) á virðisbrøvum sum skuld og lán, sum oyðileggur úrslitið fyri fjórða ársfjórðing, sum gav eitt avlop á 1,3 milliard sveisarafrankar móti einum avlopi upp á 4,7 milliardir sama tíðarskeið í fjør.

# Seriøst ungdómsting

**Mánadagin og týsdagin skipaði formansskapurin í løgtinginnum fyri ungdómstingi, og tað vóru vælnøgdir luttakarar, sum fóru til húsa aftur seinnapartin í gjár**

UNGDÓMSTING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Heri Arge og Elsbeth Petersen úr Argja skúla vóru sera fegin um at hava verið við til ungdómstingið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað vóru spennandi og produktivir dagar í ungdómstinginum fyrst í vikuni.

Tað halda í hvussu er tveir av »tinglimunum« í ungdómstinginum, Heri Arge og Elsbeth Petersen úr Argja skúla.

Og sigast má, at limirnir í ungdómstinginum hava ikki ligið á latu síðuni. Inn vóru komin 11 uppskot frá seks ymiskum flokkum, umboðandi Sørvágs skúla, skúlanum við Ziskatrøð, Argja skúla (tveir flokkar), Eysturskúlan og Venjingarskúlan.

Uppskotini vórðu løgd fram og fingu fyrstu viðgerð, áðrenn tey vórðu beind í nevnd mánadagin, nevndarviðgerð fór fram fyrrapartin týsdagin og seinnapartin fingu tey so endaliga viðgerð og komu til atkvøðugreiðslu.

Seks av teimum ellivu uppskotunum vórðu samtykt, meðan hini fimm vórðu feld. Einki uppskot fall burtur.

Tá ungdómstingið endaði, kundi løgtingsformaðurin boða frá, at limirnir í ungdómstinginum høvdu hildið 285 røður ella viðmerkingar í seks tímar og eitt korter. Teir høvdu havt 18 munnligar fyrispurningar til løgmann og landsstýrisfólk, so sigast má, at limirnir høvdu verið ógvuliga produktivir.

### Super feitt

Tá ungdómstingið endaði, fekk Sosialurin orðið á tveir av tinglimunum, Hera Arge og Elsbeth Patersen úr Argja skúla.

- Hetta var super feitt. Tað var stuttligt at sleppa at royna tað, sum politikararnir gera, vóru tey bæði samd um.

Hetta ungdómstingið gjørdist nógv meiri spennandi, enn tey bæði høvdu roknað við.

- Vit trúðu slett ikki, at vit sluppu at vera so nógv við. Vit hildu ikki, at vit skuldu sita so nógv inni í tingsalinum, men roknaðu við, at vit bara skuldu lurta eftir politikarunum, søgdu Heri og Elsbeth.

Ungdómstingið var skipað soleiðis, at øll tey luttakandi skuldu hava orðið í minsta lagi einaferð, men sum í tí veruliga tinginum vóru summi títtari á røðarapallinum enn onnur.

Fyri flokkin hjá Hera Arge og Elsbeth Petersen var galdandi, at onkur meldaði til beinanvegin, meðan meiri trekt gekst at fáa kvotuna fylta.

- Tað skuldu sita seks frá hvørjum flokki í tinginum, og eg var við uppá tað alla tíðina. Eg meldaði meg til sum tann fyrsti, tá tingið skuldi mannast, sigur Heri Arge.

- Og eg var tann seinasta, sum kom við, leggur Elsbeth aftrat.

Meðan Heri Arge frammanundan er politiskt áhugaður, er tað meiri so sum so við hesum áhuganum hjá Elsbeth Petersen.

- Men eg skilji í hvussu er nógv betur politikkin nú, sigur Elsbeth Petersen.

Tey eru annars ovfarin av, hvussu seriøst tey eru blivin tikin av etableraðu politikarunum. Og at øll taka hetta í álvara sást væl av, at øll landsstýrisfólkini umframt løgmann vóru møtt upp til munnligu fyrispurningarnar frá ungdómstinginum.

Ein uppliving, sum tey bæði, Heri Arge og Elsbeth Petersen, eru ógvuliga fegin um at hava fingið.



*Ungdómstingið fekk ein buldrasligan enda, tá úthurðin fór í smæsta smildur, tá ein genta skuldi lata hana upp*

*Mynd: Álvur Haraldsen.*